# Ársfrágreiðing

# 2009

NORÐOYATUNNILIN

**13. apríl 2010**

# Frágreiðing
# til aðalfundin 13. apríl 2010
**(fyri árið 2009)**

## 1. Nevndin og felagið

Nevndin hevur í 2009 havt 6 fundir.

Á seinasta aðalfundi vóru allir 5 nevndarlimirnir afturvaldir. Í nevndini vóru valdir Bergur í Garði, Jens Kári Vilhelm, Heri M. Hammer, Bjarni A. Bjarnason og Johanna á Bergi. Nevndin skipaði seg við Bergur í Garði sum formanni og Jens Kára Vilhelm sum næstformanni.

Í apríl boðaði Bjarni A. Bjarnason frá, at hann tók seg úr nevndini. Í samráð við Innlendismálaráðið varð eingin nýggjur nevndarlimur valdur fyri Bjarna A. Bjarnason.

Felagið hevur egna skrivstovu í leigaðum hølum á Skansavegi 7. Raksturin er skipaður í samstarvi við P/F Vágatunnilin, sum nýtir somu hølir, útgerð og starvsfólk. Millumroknað verður í mun til nýtsluna hjá hvørjum felagi sær.

Einans nevnd og stjóri eru sett í felagnum. Øll onnur starvsfólk verða nýtt í samstarvi við P/F Vágatunnilin. Allur tekniskur rakstur er lagdur í uttanhýsis rakstraravtalur.

Umsetningurin var í 2009 26,8 mió kr og er hetta 2,6 mió kr meira enn fíggjarætlanin fyri 2009. Av rakstrinum fóru 4,1 mió kr til rakstur av tunli og vegum, 3,0 mió kr til innkrevjing og fyrisiting, 0,5 mió kr til tryggingar og 17,1 mió kr til rentur og avskrivingar. Inntøkur og útreiðslur javnvigaðu og gjørdist ársúrslitið sostatt 0,9 mió kr. betur enn ætlanin. Í ætlanini varð roknað við einum halli á 0,9 mió kr. Orsøkin til betraða úrslitið er, at í ætlanini varð roknað við eini niðurgongd í ferðsluni orsaka av fíggjarkreppuni.

## 2. Virksemi

Endamálið hjá felagnum er smb. viðtøkunum at útvega fast samband millum Eysturoy og Norðoyggjar, hava rakstur av fasta sambandinum um hendi umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

Í høvuðsheitunum hevur arbeiðið fevnt um evnini, ið nærri eru lýst niðanfyri.

## 2.1 Tunnilsarbeiðið

Nógv av vanliga viðlíkahaldinum av tunlinum liggur í føstum skipanum, og eru tænastusáttmálar gjørdir við fleiri fyritøkur um ymiskar tænastur, t.d. viðv. el-innstallatiónunum, pumpuskipanini, gjaldstøðini, reingerð av tunlinum, dagligt eftirlit í tunlinum v.m.

Í ársfrágreiðingunum fyri 2007 og 2008 varð nevnd træta, sum hevði tikið seg upp við arbeiðstakaran í sambandi við at eftirlitið hevur víst á, at PP-fibrar mangla í betonginum fleiri staðni í tunlinum. Trætan viðvíkjandi manglandi PP-fibrum endaði við, at málið bleiv lagt fyri Referansubólkin, og niðurstøðan hjá bólkinum varð, at hann ikki kundi góðkenna nøkur økir, og tí skuldi Føroya Konsortii sproyta í alt uml. 90 $m^3$ av betongi á hesi økir. Hetta arbeiðið varð gjørt á várið 2009, og við hesum er málið viðvíkjandi manglandi PP-fibrum endaliga avgreitt.

Í samband við lekarnar fyri tveimum árum síðan, er framvegis ósemja við Føroya Konsortii um kostnaðin fyri tað arbeiðið, sum varð gjørt í hesum sambandi. Eisini er ósemja um hvat skal henda við pumpuleidningin, sum hann liggur. Felagið ynskir at fáa vissu fyri, at allar tær sveisingar sum ikki eru kannaðar eru sveisaðar sambært krøvunum, og at slíkir lekar ikki henda aftur. Samskifti er tó framvegis við Føroya Konsortii og eru partarnir komnir ásamt um, at málið skal sendast til referansubólkin at taka støðu.

Tað áliggur tunnilsfelagnum at taka arbeiðsvegin, ið gongur gjøgnum fjøruna í Leirvík og niðan í verandi tunnilsveg burtur, og endurskapa fjøruna og lendið annars. Bíðað hevur verið eftir hvat hendir við landsvegnum gjøgnum Leirvík, áðrenn farið verður undir at taka arbeiðsvegin burtur.

Uml. 11.000 $m^3$ av gróti liggur á Kráartanga í Leirvík. Grótið er av sera missjavnari góðsku. Mett verður, at uml. 7-8.000 $m^3$ er brúkiligt tilfar, meðan restin má tyrvast. Tað áliggur felagnum at fáa grótrúgvuna burtur av økinum á Kráartanga. Her hevur eisini verið bíðað eftir hvat hendir við landsvegnum gjøgnum Leirvík.

Á heysti 2008 varð tunnilin kannaður fyri leyst grót v.m. av Sweco Grønner. Niðurstøðan varð, at fleiri nýggir fjallaboltar skuldu monterast og nakað av leysum gróti skuldi reinsast niður. Eisini vórðu viðmerkingar gjørdar til nógv økir, har alt ov nógv vatn kom niður á vegbreytina. Við grundarlagi í frágreiðingini frá Sweco Grønner, varð arbeiðið bjóðað út millum tveir veitarar, og á várið og heystið 2009 bleiv alt arbeiðið viðv. bolting og skróting framt. Eisini blivu nógvar ábøtur gjørdar viðv. lekum, har vatn kom niður á vegbreytina. Hetta er tó ein afturvendandi trupulleiki, av tí at tað koma nýggir lekar alla tíðina.

Pumpuverkið í tunlinum hevur koyrt væl í 2009 og einans smærri umvælingar eru gjørdar. Tað eru 3 pumpusett í tunlinum, og hvørt ár verður høvuðseftirlit framt av einum pumpusetti.

Vatnnøgdin sum verður pumpað úr tunlinum hevur verið støðug, uml. 1600 tons um samdøgrið, ella 1100 litrar um min., sum er sama nøgd, sum tá tunnilin opnaði.

Síðan tunnilin lat upp fyri ferðslu, hevur felagið havt eina avtalu við Leirvíkar/Eysturkommunu um íbinding av tunnilsvegnum í kommunala vegin. Í vár vildi kommunan ikki leingja hesa avtalu. Orsøkin til at kommunan ikki vil leingja hesa avtalu er, at neuðugur peningur ikki er avsettur til avtalaðu vegaføringina. Hetta er ein ósemja sum P/F Norðoyatunnilin ikki beinleiðis er partur av og ikki hevur møguleika, at gera nakað við.

## 2.2 Fígging

Íleggingargrunnurin fyri Føroyar veitir fígging til verkætlanina. Av fíggingini vóru við árslok 2009, 112 mió eftir at gjalda niður. Felagið hevur í 2009 rindað 5,6 mió kr í rentu og rindað avdráttir uppá 50 mió kr. Í 2009 hevur Landsstýrið goldið felagnum seinastu kapitalhækkingina kr. 42,5, og er partapeningurin hjá felagnum hereftir kr. 235 mill.

## 2.3 Ferðsla, nýtslugjald og gjaldstøð

Ferðslan hevur í 2009 verið í miðal 1913 bilar/samdøgur í mun til 1897 bilar/samdøgur í 2008, ein vøkstur á 0,8%.

Á myndini niðanfyri, sæst hvussu ferðslan er deild yvir árið, hvat miðalferðslan hevur verið einstøku mánaðirnar í 2007, 2008 og 2009.




Mynd 1. Miðalferðsla pr dag

Á myndini á næstu síðu er víst indeks fyri ferðsluna síðan tunnilin lat upp 29. apríl 2006, og hvussu gongdin í meðalgjaldinum fyri hvørt akfar hevur verið (2006 er sett til 100).




Mynd 2. Index fyri umsetning pr. akfar og fyri ferðslu

Gongdin vísur at samlaða ferðslan næstan stendur í stað í mun til árið fyri, men at tey íð gera nýtslu av tunlinum gjalda meira fyri hvønn túrin.

Samlaða ferðslan síðan tunnilin opnaði, tølini niðanfyri, svara til mynd 3:

| | |
|---|---|
| Ár 2006: | 448.884 akfør |
| Ár 2007: | 662.828 akfør |
| Ár 2008 | 694.398 akfør |
| Ár 2009: | 698.460 akfør |




Mynd 3. Ferðsla 2006, 2007, 2008 og 2009.

Tað skal viðmerkjast, at ferðslutølini fyri 2006 eru frá 29. apríl 2006, tá tunnilin opnaði. Sostatt eru 8 mánaðir taldir við í 2006.

Miðalprísurin sum hvørt akfar hevur goldið lækkaði tey fyrstu árini, men seinasta ár hækkaði miðalprísurin uml. 3 kr. í mun til 2008. Í 2006 var miðalprísurin 89,40, í 2007 kr. 82,9, í 2008 kr. 73,40 og í 2009 var miðalprísurin fyri hvørt akfar kr. 76,4. Teir nevndu prísirnir eru teir, skuldskrivað verður tá koyrt verður framvið gjaldstøðina. Hetta gevur ein miðalprís í 2009 á kr. 38,2 hvønn vegin.




Mynd 4. Miðalprísur pr. akfar í 2006, 2007, 2008 og 2009

Arbeitt verður áhaldandi við at betra innkrevjingina og gera hana meiri smidliga fyri kundarnar.

Gjaldsskipanin er ein felags skipan við P/F Vágatunnilin, men er soleiðis háttað, at klárt mark er millum fíggjarligu viðurskiftini hjá feløgunum.

## 2.5 Heilsa, trygd og umhvørvi

Sum partur av støðuga arbeiðinum við at halda trygdina á einum høgum støði, verður tunnulin støðugt kannaður og hevur hetta ført til eitt ávíst viðlíkahaldsarbeiði. Fyri at darva ferðsluna sum minst og fyri at fasthalda trygdina, er gjørt av, at tá arbeitt verður á vegbreytini verður tunnilin stongdur og arbeitt verður um náttina. Tó verða bilar leiddir gjøgnum tunnilin annanhvønn tíma.

Eitt krav frá myndugleikunum er at tilbúgvingarætlan fyriliggur. Tilbúgvingarætlanin er gjørd í samstarv við allar partar sum kunnu hugsast verða ein liður í hjálpararbeiðnum um óhapp er í tunlinum. Tað verið seg sløkkilið, sjúkrahús, løgregla, Landsverk, Brunaumsjón Landsins o.o.

Smærri venjingar, skipaðar av lokalu brandmyndugleikunum, hava verið í tunlinum í 2008.

## 2.6 Frí ferðsla

Tað hevur verið frítt at ferðast í tunlinum ein dagin í januar, mai, septembur og desembur.Teir dagar frítt var at koyra, koyrdu íalt 21.660 akfør í 2009, 23.764 í 2008 og 30.486 akfør í 2007.

Eisini í 2010 er avtala gjørd um, at ársdagarnir tá ávikavist Norðoyatunnilin og Vágatunnilin lótu upp fyri ferðslu skal einki nýtslugjald latast tá koyrt verður, tó verða hesir dagar lagdir til nærmasta leygardag. Umframt ársdagarnar eru 2 dagar lagdir í samráð við handilsfelagið í økinum. Dagarnir við fríari ferðslu hava stuðlað upp undir at vinnan og áhugabólkar í Norðoyggjunum hava skipað fyri serligum tiltøkum, eins og kunnleikin til tunnilin og áhugin fyri at ferðast er øktur.

### 2.7 Skipan av rakstri

Raksturin hjá felagnum er skipaður við innanhýsis virksemi - sum fevnir um leiðslu felagsins og innkrevjing av nýtslugjaldi, og við uttanhýsis tænastusavtalum, sum fevna um tekniska raksturin av tunlinum og gjaldstøðini.

Avtalað er við P/FVágatunnilin um felags rakstur, útreiðslurnar verða býttar javnt millum feløgini, tó soleiðis, at serstakar útreiðslur, ið hoyra øðrum felagnum til, verða goldnar av hesum.

## 3. Mál av samfelags- og samfelagsbúskaparligum týdningi

Verkætlanin er løgd í eitt sjálvstøðugt partafelag, ið hevur endaligu fíggjarligu ábyrgdina.

## 4. Rakstrarætlan fyri 2010

Høvuðstølini í rakstrarætlanini fyri 2010 eru víst niðanfyri.

| **Rakstur** | **mió kr** |
|---|---:|
| Umsetningur | 24,7 |
| Rakstur tunnil og vegir | -4,2 |
| Játtan til tekn. Rakstur | 0 |
| Rakstur innkrevjing | -3,7 |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar og fíggjarpostar** | 16,8 |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | -11,7 |
| Fíggjarpostar | -5,0 |
| **Ársúrslit** | 0,1 |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | 11,7 |
| Avdráttur | -8,0 |
| **Likviditetsavlop** | 3,8 |

Bert smærri íløgur hava verið í 2009. Støðisognin er við árslok uml. 331,4 mió kr. Ávísar íløgur skulu væntast í 2010.

NORÐOYATUNNILIN

## 5. Niðurstøða

Samanumtikið kann staðfestast:

- At úrslitið hjá felagnum gjørdist nakað betur enn ætlað fyri 2009
- prísbygnaðurin framhaldandi er eins fyri Vágatunnilin og Norðoyatunnilin
- prísurin at koyra gjøgnum tunnilin er støðugur

Tórshavn 13. apríl 2010

| | |
|---|---|
| Bergur í Garði, formaður | Jens Kári Vilhelm, næstformaður |
| Jóhanna á Bergi, nevndarlimur | Heri M. Hammer, nevndarlimur |
| | / Uni Danielsen, stjóri |